# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Atli Klein Olsen 65

Í morgin, fríggjadagin 30. oktober, verður Atli Klein Olsen, Undir Kletti, í Havn 65 ár.

Atli er ættaður úr Vestmanna. Hann er sonur Oluffu Klein frá Gjógv og Ingdor Olsen í Vestmanna. Hann gekk bæði í barnaskúla og í preliminerskúla í Vestmanna. Eitt skifti í 1957-58 var hann til skips, men fór tó í læru sum skrivstovumaður hjá SEV í Vestmanna.

Í 1961 kom Atli til Havnar og fór at starvast á Skattadeildini, sum tá helt til úti í Tinganesi – seinni flutti skattadeildin yvir við Strond.

Atli hevur eisini verið fakfelagsleiðari – hann gjørdist formaður í Starvsmannafelagnum eitt skifti í



sjeytiárunum. Seinni fór hann at starvast sum bókhaldari hjá bilasøluni Ivan Johansen, har hann var í nøkur ár. Síðani var hann eitt skfiti hjá Jóhannes Berg, til hann í 1991 stovnaði sítt egna bókhaldsvirki, RannTeld. Hetta virkið byrjaði í Dandastovu í Gongini, men flutti seinni í Magnus Heinasonargøtu, har Atli saman við hinum fýra starvsfólkunum framvegis húsast við bókhaldsvirkinum RannTeld.

Í 1962 giftist Atli við Ullu – tey giftust inn undir Kletti hjá Lisu, mammu Ullu, har tey hava búð síðani. Atli og Ulla hittust í Vestmanna í 1957, har Ulla javnan var og ferðaðist. Ulla og Atli eiga tríggjar døtur, Lis (1960), Oluffa (1966) og Guðrið (1973). Ommu- og abbabørnini hjá teimum eru sjey í tali í aldrinum frá 4-19 ár.

Atli og Ulla síggjast hvønn morgun í havnargøtum, tá tey fara tey ein langan gongutúr. Av Reyni gongur leiðin yvir við Strond, niðan á Háls og omanaftur í býin – og túrurin verður gingin í øllum veðri.

Atli er kendur sum ein blíður, róligur og positivur maður, sum ongantíð loypir framav. Av havnarfólki man hann vera at rokna sum ein innføddur havnarmaður, so fastgrógvin hann er í høvuðsstaðnum – kanska serliga í gamla býarpartinum á Reyni, har hann er teirra millum, sum hava búð har longst.

Føðingardagurin hjá Atla verður hildin í hølunum hjá Starvsmannafelagnum í J. H. Schrøtersgøtu í Havn í morgin, fríggjadagin kl 19 – har opið hús er, og øll eru hjartaliga væl komin.

# Vøddamýkjarar

**Sunnudagin endaði eitt 1 ára skeið á Handilsskúlanum í Havn. Har hava 25 kvinnur tikið prógv sum vøddamýkjarar**

VØDDAMÝKING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

25 kvinnur hava tikið 1 ára skeið sum vøddamýkjarar og sunnudagin endaði skeiðið á Handilsskúlanum í Havn. Har fingu tær prógv sum vøddamýkjarar.

Tær hava lokið frálæru í øllum mýkingargreinum, so sum kropsmýking, avspenningsmýking, rygg- og akupressurmýking og klassiskari mýking.

Í øllum hesum er t.d mýking við olju og vøddamýking, ið verður nýtt innan ítróttina. Og tað at fólk røra seg ov lítið í dag og ofta hava strongd, kann eisini bøtast um við hurum háttum innan vøddamýking.

Nýggju vøddamýkjararnir hava sum heild allar førleikar innan hesar í fleiri førum gomlu og viðurkendu greinar innan vøddamýking. Nýggju vøddamýkjararnir koma úr flest øllum ættum í Føroyum. Tær eru: Anna Maria Hansen, Anna Maria Persson, Irena Jacobsen, Ingun Wang Olsen, Amanda Gullaksen, Anna Eysturoy, Sigrun Egholm, Reidun Magnussen, Jonhild Johannesen, Ninna Midjord, Mirjam Carlsen, Osla Sørensen, Osla Sevdal, Mildrid Rasmusdóttir, Elsa Maria Fláaberg, Winnie Hansen, Marianna Joensen, Eyðgerð Jonhardsdóttir, Konny Joensen, Sólfríða Johannesen, Jonly Johannesen, Svea Durhuus, Eydna Weihe, Elsebeth Poulsen og Birna breckmann. Lærari hevur verið Jens Melgaard.




**Dagurin**

**29. september. Mikkjalsmessa.** Dagur hildin høvuðseinglinum Mikael til heiðurs. Ein av teimum mishalgidøgunum, sum nógv hevur verið hildið um í Føroyum, serstakliga av tí, at hann hevur verið so nær knýttur at seyðahaldi. Líka í hesi øldini vita fólk um at siga, at lestur hevur verið lisin mikkjalsmessudag eftir teksti úr Opinberingini (kap. 12, 7-12) Dilkadagur.
Bíbilska navnið Mikael merkir hvør *er sum Harrin.*